LANDSROYND
MARS 2011
Føroyskt, lesa og skilja tekst

6. FLOKKUR

# FØROYSKT

45 minuttir



| Navn: | Flokkur: |
| --- | --- |
| Skúli: | Lærari: |

Svarini verða skrivað á uppgávuarkið. Byrjað verður við fyrstu uppgávu á síðu 2, og síðani verða uppgávurnar loystar í teirri raðfylgju, tær koma. Tú kanst skriva við blýanti.

# Til næmingin

Les søgurnar og svara spurningunum

Vágur, t. 9. mars 2011

Eg eiti Maria og gangi í 6. flokki í Vágs skúla. Í mínum flokki eru 19 næmingar, 12 gentur og 7 dreingir. Flokslærarin hjá okkum eitur Halltóra. Hon hevur okkum í føroyskum og í enskum. Í síðstu viku segði hon fyri okkum, at vit skulu á setursskúla seinni í hesum mánaðinum. Fyrst helt eg, at vit bara skuldu onkran stuttan túr, men so er ikki. Vit fara til Toftir og verða har í 4 dagar. Vit skulu búgva í ítróttahúsinum á Svangaskarði, men Halltóra legði dent á, at vit ikki bara skulu spæla bólt. Vit skulu eisini vitja ymisk støð, m.o. Fríðrikskirkjuna. Umframt Halltóru koma tveir lærarar við á setursskúlan, Hanus, sum hevur okkum í ítrótti og náttúru og tøkni og Linda, sum hevur okkum í støddfrøði og tónleiki, koma við. Mær dámar væl, at Linda kemur við okkum, tí hon dugir so væl at syngja og spæla gittara. Eg haldi, at tað er so hugnaligt, tá øll sita saman og syngja, og tað giti eg, at vit fara at gera um kvøldini. Fleiri í mínum flokki dáma sang og tónleik, og fleiri spæla eisini okkurt ljóðføri. Sjálv spæli eg klaver, og mær dámar eisini sera væl at syngja.

**Set x við rætta svarið**

| Hvussu eitur flokslærarin hjá Mariu? | | Hvørjum lærugreinum undirvísir Halltóra í í 6.flokki? | |
|---|---|---|---|
| Hanus | __________ | støddfrøði og føroyskum | __________ |
| Halltóra | __________ | enskum og náttúru og tøkni | __________ |
| Linda | __________ | enskum og føroyskum | __________ |

| Hvussu nógvir lærarar fara við á setursskúlan? | | Hvat ljóðføri spælir Maria? | |
|---|---|---|---|
| tveir | __________ | gittara | __________ |
| tríggir | __________ | trummur | __________ |
| fýra | __________ | klaver | __________ |

| Nær fer 6. flokkur í Vági á seturskúla? | | Hvar fer flokkurin á seturskúla? | |
|---|---|---|---|
| í mai | ___________ | til Strendur | __________ |
| í mars | ___________ | til Runavíkar | __________ |
| í apríl | ___________ | til Toftir | __________ |

Í sambandi við seturskúlan hevur flokkurin hjá mær arbeitt við ymiskum, sum hevur við seturskúlan at gera. Vit byrjaðu hetta arbeiðið mánadagin í hesi vikuni og skulu verða liðug friggjadagin. Flokkurin arbeiðir í bólkum við trimum og fýra næmingum í hvørjum. Í fýra bólkum eru fýra næmingar, og í einum bólki eru triggir. Eg eri saman við tveimum dreingjum og einari gentu. Tey eita Kári, Martin og Lea. Tað er Halltóra, sum hevur gjørt bólkarnar. Uppgávan hjá mínum bólki er at leggja eina døgurðaætlan fyri dagarnar á Svangaskarði. Vit hava longu kannað nógvar uppskriftir. Skúlin eigur fleiri bøkur við uppskriftum í, og vit hava so roynt at finna okkurt, sum vit vita smakkar væl og er lætt at gera, tí næmingarnir skulu skiftast um at gera døgurða. Vit skulu eisini gera ein innkeypslista til hvønn døgurðan, so vit vita, hvat og hvussu nógv, vit skulu keypa til alt ferðalagið, sum telur 22 fólk.

**Set x við rætta svarið**

| Hvussu nógvir bólkar eru? | | Hvussu nógvir bólkar hava tríggjar næmingar? | |
|---|---|---|---|
| fýra | ___________ | tveir | __________ |
| tríggir | ___________ | ein | __________ |
| fimm | ___________ | tríggir | __________ |

| Bólkurin hjá Mariu arbeiðir við: | | Bólkurin hjá Mariu skal eisini gera: | |
|---|---|---|---|
| sangi og tónleiki | ___________ | innkeypslista | __________ |
| døgurðamati | ___________ | ruddingarlista | __________ |
| spølum | ___________ | vaskilista | __________ |

| Hvussu nógvir dreingir eru í bólkinum hjá Mariu? | | Hvussu nógvar gentur eru í døgurðabólkinum? | |
|---|---|---|---|
| ein | ____________ | fýra | ____________ |
| tríggir | ____________ | tvær | ____________ |
| tveir | ____________ | ein | ____________ |

Vit hava valt, at ein døgurði skal vera ein grýturættur, tí øllum í flokkinum dámar grýturætt. Tað var bara sera trupult at velja eina ávísa uppskrift, tí har vóru so nógvar. Í gjár blivu vit tó samd um ein grýturætt. Vit ætla at gera eitt lítið hefti við okkara egnu seturskúlauppskriftum í, so vit fóru beinanvegin í gongd við at skriva uppskriftina á telduna.

Her er uppskriftin til grýturættin:

Uppskriftin er til 4 persónar.

- 2 leykir
- 1 grøn piparfrukt
- 15 gr. av margarini
- 500 gr. av malnum oksakjøti
- 2 tsk av papriku
- 1 tsk av salti
- 1 dl av vatni
- 2 ssk av tomatpure
- 1 dl av súrróma

Tá ið vit høvdu valt uppskriftina, var eftir hjá okkum at finna útav, hvussu nógv vit skuldu keypa av hvørjum. Halltóra segði, at vit ikki skulu hugsa um sovorðið sum salt, paprika og tomatpure, tí tað kunnu vit taka við okkum, og hon segði okkum eisini, at tað eru 2,5 dl í einum íláti av súrróma. Tað visti eg ikki. Vit settu okkum niður at gera ein innkeypslista til tær vørur, sum vit máttu keypa til grýturættin.

**Set x við rætta svarið**

| Hvussu nógv malið kjøt má keypast? | | Hvussu nógvur leykur skal í grýturættin? | |
|---|---|---|---|
| 1000 gr. | ______ | seks | ______ |
| 1800 gr. | ______ | tíggju | ______ |
| 2500 gr. | ______ | fýra | ______ |

| Hvussu nógvir dl eru í einum ílati við súrróma? | | Hvussu nógv íløt av súrróma skulu í grýturættin? | |
|---|---|---|---|
| 1 dl | ______ | trý | ______ |
| 2,5 dl | ______ | tvey | ______ |
| 3 dl | ______ | fimm | ______ |

| Hvat av hesum trimum er á innkeypslistanum hjá bólkinum hjá Mariu: | | Hvat av hesum trimum hava tey við sær heimanifrá? | |
|---|---|---|---|
| salt | ______ | vatn | ______ |
| súrrómi | ______ | leyk | ______ |
| paprika | ______ | salt | ______ |

Meðan okkara bólkur hevur arbeitt við døgurðarættum og innkeypslista, hava allir hinir bólkarnir eisini verið í gongd. Eg havi gingið eitt sindur runt og hugt, hvat hinir bólkarnir hava gjørt. Alt sær sera áhugavert út. Sólvá, Jóhanna og Óli hava lisið eitt sindur um Friðrikskirkjuna, sum vit skulu vitja, meðan vit eru á seturskúla. Tey hava funnið upplýsingar á netinum. Tey hava skrivað um kirkjuna á teldu. Hetta hava tey sett upp á eitt stórt karton saman við nógvum vøkrum myndum. Eg havi hugt at myndunum og haldi kirkjuna vera sera vakra. Eg havi eisini lisið tekstin um kirkjuna.

Hetta skrivaðu Sólvá, Jóhanna og Óli um Fríðrikskirkjuna:

**Fríðrikskirkjan**

Fríðrikskirkjan er ein av nýggju kirkjunum í Føroyum. Hon er bygd í árunum 1992 – 94. Kirkjan varð vígd til nýtslu fyrsta sunnudag í advent, hin 27. november 1994. Umleið 1000 fólk vóru til vígsluna. Samlaði kostnaðurin av kirkjuni var tá umleið 16,1 mill. kr. Kirkjan rúmar 500 fólkum, 400 í skipinum og 100 á loftinum. Tó rúmar kirkjan fleiri fólkum til serlig tiltøk. Kirkjan verður ofta nýtt til konsertir og onnur tónleikatiltøk. Kjallarahæddin er liðugt útbygd við einum høvuðsrúmi, har um leið 250 fólk kunnu sita til borðs. Harumframt er góður og vælútgjørdur køkur, og tí verður kjallarahæddin nógv brúkt til størri tiltøk.

Kirkjan fekk navnið Fríðrikskirkjan eftir Fríðriki Petersen, ið var borin í heim í Saltnesi í 1853 og var próstur á Nesi frá 1900 – 1917. Fríðrikur sat bæði á løgtingi og var landsstýrismaður í mong ár. Umframt var hann eisini dugnaligt skald. Millum kendastu sálmarnar, hann yrkti, er "Gleðilig jól", og hann hevur eisini umsett "Faðir vár" til føroyskt.

**Set x við rætta svarið**

| Hesi hava skrivað um Fríðrikskirkjuna | | Tey hava funnið upplýsingar um kirkjuna | |
|---|---|---|---|
| Lea, Sólvá og Óli | __________ | í bókum | __________ |
| Jóhanna, Sólvá og Óli | __________ | í bløðum | __________ |
| Óli, Maria og Sólvá | __________ | á netinum | __________ |

| Nær varð Fríðrikskirkjan vígd? | | Hvussu nógv fólk vóru til vígsluna? | |
|---|---|---|---|
| í desember 1994 | __________ | uml. 500 fólk | __________ |
| í apríl 1994 | __________ | uml. 1000 fólk | __________ |
| í november 1994 | __________ | uml. 400 fólk | __________ |

| Nær er Fríðrikur Petersen føddur? | | Hvussu nógv kostaði Fríðrikskirkjan? | |
|---|---|---|---|
| í 1994 | ___________ | 16,1 mill. kr. | ___________ |
| í 1853 | ___________ | 10,2 mill. kr. | ___________ |
| í 1917 | ___________ | 14,7 mill. kr. | ___________ |

Tá eg hevði hugt eftir tí, sum Sólvá, Jóhanna og Óli høvdu gjørt um Fríðrikskirkjuna, fór eg at hyggja eftir tí, sum ferðabólkurin hevði funnið útav. Í tí bólkinum vóru Eir, Sirið, Lív og Heini. Tey skuldi m.a. gera eina ferðaskrá. Tey vistu frammanundan, at vit skulu fara við Smyrli mánadag kl. 11 av ferjuleguni á Krambatanga og av Havnini hóskvøld kl. 18.30. Ferðin við Smyrli tekur umleið tveir tímar, so Smyril er í Suðuroy kl. 20.30. Bussur verður leigaður úr Havn til Toftir og aftur. Bólkurin skuldi tí fyrst og fremst finna út av, nær vit skulu fara úr Vági, og nær vit verða aftur í Vági.

**Set x við rætta svarið!**

| Hvørjum arbeiðir Lív saman við? | | Hvar er ferjulegan? | |
|---|---|---|---|
| Eir, Jóhonnu og Heina | ___________ | í Sumba | ___________ |
| Óla, Heina og Sirið | ___________ | á Krambatanga | ___________ |
| Sirið, Heina og Eir | ___________ | í Lopra | ___________ |

| Nær fer 6. flokkur úr Vági fyri at náa við Smyrli kl. 11. | | Nær verður flokkurin aftur í Vági? | |
|---|---|---|---|
| kl 8.40 | ___________ | kl. 21.00 | ___________ |
| kl. 10.05 | ___________ | kl. 21.15 | ___________ |
| kl. 9.45 | ___________ | kl. 21.30 | ___________ |

## Her er ferðaætlanin fyri leið 700 (er tikin av www.ssl.fo)

X: gerandisdagur
6: leygardagur
7: sunnudagur
Tølini standa annars fyri dagarnar, 1 fyri mánadag, 2 fyri týsdag o.s.fr

### 700 Sumba - Vágur - Tvøroyri

| Dag | Sumba | Lopra | Vágur | Porkeri | Hov | Øravík | Ferjulegan | Tvøroyri |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 05:00[T] | 05:10[T] | 05:25 | 05:30[T] | 05:40[T] | 05:45[T] | 05:50 | 06:00 |
| 2345 | 06:00[T] | 06:10[T] | 06:25 | 06:30[T] | 06:40[T] | 06:45[T] | 06:50 | 07:00 |
| X | 07:00[T] | 07:05[T] | 07:15 | 07:25[T] | 07:30[T] | 07.35 | | 07:45 |
| X7[T] | 07:25 | 07:35 | 07:50 | 07:55 | 08:10[T] | | 08.20 | 08.30 |
| 6 | 08:20[T] | 08:30[T] | 08:40 | 08:45[T] | 08:55[T] | | 09:00 | |
| 13 | 09:45 | 09:55[T] | 10:05 | 10:10[T] | 10:20[T] | | 10:30 | |
| X | 13:00[T] | 13:10[T] | 13:15 | 13:20[T] | 13:30[T] | 13:35 | 13:40[T] | 13:45 |
| X | | | 14.15 | 14.20 | 14.30 | | | 14.50 |
| x | 14:30[T] | 14:40[T] | 14:55 | 15:00[T] | 15:10[T] | | 15:20 | 15:30 |
| x | | | 16:20 | 16:25[T] | 16:35[T] | | | 16:55 |
| 7 | 16:30[T] | 16:35[T] | 16:50 | 16:55[T] | 17:05[T] | 17:15[T] | 17:20 | |
| X6 | 17:10[T] | 17:15[T] | 17:30 | 17:35[T] | 17:45[T] | 17:55[T] | 18:00 | |
| 2345 | | | 20:00 | | | | 20:20 | |
| 7 | | | 21:30 | | | | 21:50 | |
| 16 | | | 22:30 | | | | 22.50 | |

### 700 Tvøroyri - Vágur - Sumba

| Dag | Tvøroyri | Ferjulegan | Øravík | Hov | Porkeri | Vágur | Lopra | Sumba |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| x | 07:15 | | 07:25[T] | 07:30 | 07:40 | 07:50 | 08:05[T] | 08:15[T] |
| X | 07:45 | | 08:05 | 08:10[T] | 08:30[T] | 08:35 | | |
| 6 | ( 08:50 ) | 09:00 | 09:10[T] | 09:20[T] | 09:30[T] | 09:35 | 09:50[T] | 10:00[T] |
| 13 | ( 10:20 ) | 10:30 | 10:40[T] | 10:45[T] | 10:55[T] | 11:00 | 11:20[T] | 11:25[T] |
| 4 | (11.10) | 11:20 | 11:25[T] | 11:35[T] | 11:45[T] | 11:50 | 12:05[T] | 12:10[T] |
| 7 | | 12.50 | 12.55[T] | 13.05[T] | 13:15[T] | 13:20 | 13:35[T] | 13:45[T] |
| X | 13:10 | | | 13:30[S] | 13:35[T] | 13:40 | 13:55[T] | 14:00[T] |
| 1234 | | | | | | 14:15 | 14:25 | 14:30 |
| x | 14:50 | 15:00 | | 15:10[S] | 15:15[T] | 15:20 | 15:35[T] | 15:40[T] |
| x | 16:05 | | | 16:20[ST] | 16:25[T] | 16:30 | 16:35[T] | 16:55[T] |
| x | 17:05 | | 17:15[T] | 17:30[T] | 17:35[T] | 17:40 | 17.55[T] | 18:05[T] |
| 136 | ( 17:50 ) | 18:00 | 18:05[T] | 18:15[T] | 18:20[T] | 18:25 | 18:40[T] | 18:50[T] |
| 2345 | ( 20:20 ) | 20:30 | 20:35[T] | 20:45[T] | 20:55[T] | 21:00 | 21:15[T] | 21:25[T] |
| 7 | | 21:50 | 21:55[T] | 22:05[T] | 22:15[T] | 22:20 | 22:35[T] | 22:45[T] |
| 16 | | 22:50 | 22:55[T] | 23:05[T] | 23:15[T] | 23:20 | 23:35[T] | 23:40[T] |

■ Bert skúladagar. / *Only schooldays.*

T) Bert eftir tilkalling á tel 23 95 50 / 23 95 50. Til morgunleiðirnar fyri kl. 21:00 kvøldið fyri.
*Only by request on tel. 23 95 51 / 23 95 51. For morning trip at the latest before 9pm on the day before.*

S) Busssamband við Grønadal (Skúladepilin). *Via Grønadal (High- and Health School)*

Av tí at vit skulu búgva á Svangaskarði, meðan vit eru á seturskúla, vildi ein bólkur ógvuliga fegin sleppa at arbeiða við landsliðsfótbólti. Tíbetur vóru fleiri í bólkinum sera áhugað í ítrótti, og onkur í bólkinum hevur eisini fleiri ferðir sæð landsdystir í fótbólti. Tóki er tann í bólkinum, sum hevur sæð flestar landsdystir av øllum næmingunum í flokkinum. Hann spælir sjálvur bæði fótbólt og hondbólt í Vági, og eg veit, at hann eisini er byrjaður at spæla flogbólt við TB. Eg skilji ikki, at tíðin røkkur til hjá honum. Umframt hann eru Sigrið, Durita og Malan í bólkinum, og tær iðka eisini allar ítrótt. Sigrið og Malan spæla hondbólt, og Durita spælir fótbólt. Tey fýra hava savnað upplýsingar um allar landsdystir, sum føroyska A-landsliðið hevur spælt á Svangaskarði. Tey hava skrivað øll úrslitini niður, allar málskjúttarnar, áskoðaratal og stigatalvurnar fyri kappingarnar. Eg undraðist yvir, at tey høvdu klárað at gjørt so nógv í so stutta tíð.

Sjálv havi eg ikki so stóran áhuga í ítrótti. Eg havi spælt fótbólt, tá eg var yngri, men tað var ikki rættiliga nakað fyri meg. Eg havi eisini svomið eitt sindur, men mær dámar ikki so væl kappingar, so nú svimji eg bara, tá eg havi hug til tað. Fleiri í mínari familju iðka ítrótt. Mamma mín hevur í nógv ár spælt hondbólt við besta kvinnuliðnum hjá VB, og báðar systrarnar og beiggi mín spæla fótbólt. Tað eru bara pápi mín og eg í húsinum hjá okkum, sum ikki leggja so nógv í ítrótt. Okkum báðum dámar nógv betur tónleikin.

**Set x við rætta svarið**

| Hvønn ítrótt iðkar Tóki? | | Hvørja ítróttagrein iðkar Malan? | |
|---|---|---|---|
| fótbólt, tennis og svimjing | _________ | fótbólt | ___________ |
| flogbólt, fótbólt og hondbólt | _________ | hondbólt | ___________ |
| borðtennis, svimjing og fótbólt | _________ | flogbólt | ___________ |

| Hvør í flokkinum hevur sæð flestar landsdystir? | | Hvussu eita genturnar í landsliðsbólkinum? | |
|---|---|---|---|
| Maria | ____________ | Sigrið, Eir og Lea | ____________ |
| Óli | ____________ | Lea, Drós og Durita | ____________ |
| Tóki | ____________ | Durita, Sigrið og Malan | ____________ |

| Hvørjum liði hevur mamma Mariu spælt við? | | Hvønn ítrótt hevur mamman íðkað? | |
|---|---|---|---|
| Besta kvinnuliðnum hjá TB | ________ | fótbólt | ________ |
| Besta kvinnuliðnum hjá VB | ________ | hondbólt | ________ |
| Besta kvinnuliðnum hjá Royn | ________ | flogbólt | ________ |

Á síðu 12 er yvirlitið, sum landsliðsbólkurin hevur gjørt yvir EM-undankappingina fram ímóti EM 1996, sum Føroyar var við í. Her eru bara yvirlit yvir dystirnar, sum vórðu spældir á Svangaskarði. Útidystirnir í kappingini eru ikki við. Harafturat er endaliga støðan í bólkinum tikin við.

**EM 1996: (Dystirnir í EM-undankappingini vórðu spældir í 1994 og 1995)**

**7. sept. 1994, Toftir, Føroyar**

Føroyar – Grikkaland 1-5 (0-2)

0-1: Saravakos, 12.

0-2: Tsalouchidis, 17.

0-3: Alexandris, 55.

0-4: Alexandris, 61.

0-5: Tsalouchidis, 86.

1-5: Apostolakis sjálvmál, 90+1.

Áskoðaratal: 3000

**26. apríl 1995, Toftir, Føroyar**

Føroyar – Finland 0-4 (0-0)

0-1: Hjelm, 55.

0-2: Paatelainen, 75.

0-3: Lindberg, 78.

0-4: Helin, 83

Áskoðaratal: 1338

**25. mai 1995, Toftir, Føroyar**

Føroyar – San Marino 3-0 (2-0)

1-0: Jens Kristian Hansen, 6.

2-0: Jens Erik Rasmussen, 9.

3-0: Julian Jonsson, 52.

Áskoðaratal: 3450

**7. juni 1995, Toftir, Føroyar**

Føroyar – Skotland 0-2 (0-2)

0-1: McKinlay, 25.

0-2: McGinlay, 29.

Áskoðaratal: 3881

**6. sept. 1995, Toftir, Føroyar**

Føroyar – Rusland 2-5 (1-1)

0-1: Mostovoi br., 9.

1-1: Henning Jarnskor, 12.

2-1: Todi Jónsson, 53.

2-2: Kiryakov, 61.

2-3: Kolyvanov, 65.

2-4: Tsymbalar, 83

2-5: Shalimov, 85.

Áskoðaratal: 1792

**Endaliga støðan í bólkinum, sum Føroyar spældu í í EM-undankappingini 1996.**

**Stigatalva**

| Lið | D | V | J | T | Mál | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Rusland | 10 | 8 | 2 | 0 | 34-5 | 26 |
| Skotland | 10 | 7 | 2 | 1 | 19-3 | 23 |
| Grikkaland | 10 | 6 | 0 | 4 | 23-9 | 18 |
| Finland | 10 | 5 | 0 | 5 | 18-18 | 15 |
| Føroyar | 10 | 2 | 0 | 8 | 10-35 | 6 |
| San Marino | 10 | 0 | 0 | 10 | 2-36 | 0 |

D = dystir   V = vunnir dystir   J = javnleikir   T = taptir dystir

**Set x við rætta svarið**

Hvat var úrslitið ímillum Føroyar og Grikkaland 7. september í 1994?

1 – 4 ____________

3 – 1 ____________

1 – 5 ____________

Hvussu nógv vann Føroyar á San Marino 25. mai 1995?

1 – 0 ____________

3 – 0 ____________

2 – 0 ____________

Hvør skeyt fyrsta málið í dystinum ímillum Føroyar og San Marino 25. mai 1995?

Julian Johnson ____________

Jens Kristian Hansen ____________

Torkil Nielsen ____________

Hvør av dystunum hevði flest áskoðarar?

Føroyar – Grikkaland ____________

Føroyar – Skotland ____________

Føroyar – San Marino ____________

| Hvør dystur hevði lægst áskoðaratal? | | Hvat lið fekk flest stig í EM undankappingini 1996? | |
|---|---|---|---|
| Føroyar – Rusland | ___________ | Føroyar | ___________ |
| Føroyar – San Marino | ___________ | Rusland | ___________ |
| Føroyar – Finland | ___________ | Skotland | ___________ |

| Hvussu nógv stig fingu Føroyar í EM undankappingini 1996? | | Hvussu nógvar dystir vann føroyska A-landsliðið í hesi kapping? | |
|---|---|---|---|
| 4 | ___________ | tveir | ___________ |
| 2 | ___________ | ein | ___________ |
| 6 | ___________ | ongan | ___________ |

**Set S (satt) ella Ó (ósatt) á regluna**

6. flokkur í Vági fer á seturskúla á Svangaskarði á Toftum? ___________

20 fólk eru í ferðalagnum ___________

Maria hevur ofta verið á Toftum ___________

Tóka dámar sera væl fótbólt og hevur sæð nógvar landsdystir ___________

Pápi Mariu dámar tónleik ___________

Bólkurin hjá Mariu ger eitt hefti við seturskúlauppskriftum ___________

Í EM-undankappingini 1996 spældi Føroyar 5 landsdystir á Svangaskarði ___________

Føroyska landsliðið vann ein dyst á Svangaskarði í hesi undankapping ___________

Til dystin Føroyar – Grikkaland vóru 2000 áskoðarar ___________

Prent: Føroyaprent